# Eiga at avskipa loftvegis

**Hetta er einasta bjargingin hjá okkara fiskivinnu, sigur Kári Hansen, fiskaseljari. Og hann heldur eisini, at landið eigur at hjálpa til at fáa eina slíka farleið á føtur**

KAPPINGARFØRIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Fiskurin fer altíð har, sum prísurin er bestur. Soleiðis er tað og soleiðis skal tað vera.

Kári Hansen er fiskaseljari á Strondum. Hann er eisini ein av teimum, sum hava flutt nógvan óvirkaðan fisk av landinum.

Men hann sigur, at tað er ongin orsøk til at gera hendan spurningin fløktari enn hann er.

– Hetta er í veruleikanum rættiliga einfalt. Tað er peningurin, sum stýrir rávørugongdini og fiskurin endar har, prísurin fyri hann er bestir. Alt annað er uttanumtos.

Kári Hansen ásannar samstundis, at kappingarførið hjá vinnuni er vánaligt.

Men hann sigur, at tað er alt ov einoygt at stara seg blind upp á lønarlagið.

– Sjálvandi hevur lønarlagið stóran týdning. Men tað er ikki tað, sum hevur forkomið okkara kappingarførið, sigur hann.

Hann sigur, at orsøkin til at kappingarførið er so ringt, er, at tað er so trupult at sleppa av við fisk, tí flutningsmøguleikarnir eru so vánaligir.

– Tá ið føroyskar fiskavørur koma á marknaðin, eru tær upp ímóti vikugamlar. Sostatt halda tær sær bara nakrar fáar dagar afturat í køldiskinum.

– Hinvegin gera íslendingar nógv burturúr at flúgva feskar fiskavørur á marknaðin. Sostatt eru íslendskar fiskavørur 24-48 tímar gamlar, tá ið tær verða lagdar í køldiskin í eini krambúð niðri á meginlandinum í Evropa og sostatt heldur tann fiskurin sær einar 10 dagar afturat.

– Tað hevði ført við sær, at fiskurin hevði verið nógv betri og tað hevði aftur ført til nógv hægri prís.

**Fær nógv hægri prís**

Kári Hansen sigur, at keyparanir eru sinnaðir at betala nógv meiri fyri tann heilt feska fiskin. Nakað krónutal vil hann ikki seta á, men hann sigur, at talan er um fleiri krónur og tað hevði sæst aftur í avreiðingarprísinum.



*– Tað eru ikki proformasølurnar, sum gera, at fiskur fer óvirkaður av landinum. Hann fer óvirkaður av landinum, tí har er prísurin best. Alt annað er uttanumtos, sigur Kári Hansen, fiskaseljari*

– Tað er nevniliga prísurin á marknaðinum, sum er avgerandi fyri avreiðingarprísin.

Hugskotið um at leggja avgjald á fisk, sum fer óvirkaður av landinum, heldur hann onki um.

– Tað einasta, sum fæst burturúr tí, er, at avreiðingarprísurin fer at lækka við somu upphædd, sum avgjaldið er, tí avgjald skapar ikki hægri marknaðarprísir. Tað hækkar bara kostnaðarstøðið.

– Tað einasta, eitt slíkt avgjald vildi ført við sær, var at gjørt einum parti av vinnuni, sum ber seg, fortreð fyri at hjálpa einum øðrum parti av vinnuni, sum ikki fer at bera seg kortini.

– Tað er ongin, sum sendir óvirkaðan fisk av landinum til stuttleika. Tað verður altíð gjørt tí at prísurin er betri uttanands. Tað eru ikki proformasølur sum gera, at fiskurin fer óvirkaður av landinum. Hann fer óvirkaður av landinum, tí prísurin er best uttanlands.

**Flogfar hvønn dag**

Kári Hansen sigur, at einasti vegur hjá føroysku fiskivinnuni, er at fáa betri flutning ímillum Føroyar og umheimin.

– Tað einasta rætta er at hava flogfar at flúgva feskar fiskavørur úr Føroyum niður á marknaðin hvønn einasta dag.

– Uttan at hann kennir nakað serligt til tað, heldur hann, at eitt flogfar hevði kanska tikið eini 10-15 tons av flaki við tí flogvølli, sum er nú. Tað svarar til eini 30-45 tons av rundum fiski og tað er hóast alt ikki so lítið. Men hann heldur, at tað er neyðugt, at landið er við í eini tílíkari ætlan.

– Verður ein slík flogruta sett á stovn, er tað neyðugt, at fiskavirkini hava onki minni enn 100% trygd fyri, at hon verður verandi minst eitt ár ísenn.

Tí má landskassin tryggja eitt møguligt undirskot av eini slíkari rutu.

– Hetta er ikki almennur stuðul. Hetta er at skapa fortreytir og tað er júst hetta, sum er ein politiskt uppgáva.

Kári Hansen sigur, at vit hava eitt flogfelag í landinum, við bæði flogskiparum, tekniskari deild og øllum, sum har til hoyrir, so tað skal ikki so nógv til at skipa eina slíka rutu. Tað skal bara eitt farmaflogfar til og hann vildi helst, at tað næsta flogfarið hjá Atlantsflogi verður eitt farmaflogfar.

Tað ljóðar kanska dýrt at senda fisk av landinum við flogfarið. Men tað stúrir Kári Hansen ikki fyri.

– Við flogfarið er tað bara sjálvt flakið, sum verður flutt út. Tá ið heilur fiskur fer av landinum, eru bæði høvd, ryggir, skræða og alt annað, sum ikki verður brúkt, og sum er 2/3 av hvørjum fiski.

– Í løtuni betala útflytarar 2-3 krónur fyri kilo í farmagjald fyri heilan fisk. Fyri fløk er fraktin einar seks sjey krónur fyri kilo, so tað verður ikki so stórur munur.

Samstundis kann flogfarið so flyta farm heimaftur við.

Kári Hansen ivast ikki í, at varð ein slík flogruta sett á stovn høvdu smá virki við hondskerarum farið at stungið seg upp ymsastaðni, tí tað verður alt nógv einfaldari.

– At taka kappingina upp við kinesarar og onnur lágønarlond um frystan fisk, er fáfongt. Skal fiskivinnan í Føroyum yvirliva, mugu vit leggja størsta dentin á dygdina. Og dygdin er allarbest í feskum fiskavørum.

– Í somu løtu, fiskurin er frystur, versnar dygdin og so kunnu vit akkurát tað sama seta frystarar umborð á skipini og senda lastina til Kina at verða uppsagaða.



*– Tað einasta rætta er at hava flogfar at flúgva feskar fiskavørur úr Føroyum niður á marknaðin hvønn einasta dag.*
*– Verður ein slík flogruta sett á stovn, er tað neyðugt, at fiskavirkini hava onki minni enn 100% trygd fyri, at hon verður verandi minst eitt ár ísenn.*
*Tí má landskassin tryggja eitt møguligt undirskot av eini slíkari rutu.*

*Tilvildarlig mynd*



Òli Jacobsen:

# TV2 sigur ósatt

**Formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur sent ein klagu til TV2 um tíðindini viðvíkjandi miðalinntøkuni hjá føroyskum fiskimonnum. Tølini eru púra burturvið, sigur Òli Jacobsen**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

So var aftur rok um blokkin og skattalættin til fiskimenn. Serliga kjakið um blokkin var gløðandi heitt fyri ikki so langari tíð síðani, og nú er tað við at hitast uppaftur.

Danska sjónvarpsrásin hevði mánakvøldið eitt innslag um hýruna hjá føroyskum fiskimonnum. Dagur og vika vísti týskvøldið føroysku hyggjarunum innslagið, sum millum annað staðfestir, at føroyskir fiskimenn í miðal vinna 664.000 krónur árliga – eftir at skatturin er goldin. Hetta merkir, at fiskimenn í miðal forvinna meira enn eina millión árliga áðrenn skatt. Sambært Hagstovu Føroya vóru tað í 2002 »bert« 109 fólk við einari inntøku omanfyri milliónina í Føroyum, og góð 140 fólk forvunnu sær millum 800.000 og milliónina.

Danska TV2 sigur eisini, at orsøkin til, at føroyskir fiskimenn vinna í miðal tvífalt so nógv sum føroyingar er, at skattalættin letur seg gera við góðum stuðuli úr Danmark umvegis blokkstuðulin.



*Formaðurin í fiskimannafelagnum hevur ringt við at finna orð at lýsa innslagið, ið TV2 sendi mánakvøldið*

**Blóðskeivt**

Men tølini hjá TV2 fella í góða jørð hjá Fiskimannafelagnum. Formaðurin í felagnum, Òli Jacobsen, sigur, at TV2 nýtir tøl, sum ikki hava við veruleikan at gera.

– Eg veit ikki, hvar TV2 fær hasi tølini frá, men tey koma í øllum førum ikki frá okkum. Hetta er so langt úti, at eg havi ikki orð fyri tí, sigur Òli Jacobsen.

Hagstova Føroya byggir síni hagtøl um inntøkur hjá fiskimonnum á tøl frá Fiskimannafelagnum, og tískil undrar útspælið hjá TV2 øll.

Ein uppgerð, sum Òli Jacobsen hevur gjørt, vísir, at inntøkurnar í fjør í miðal vóru 286.000 krónur eftir skatt. Altso meira enn helvtina av tí, ið TV2 sigur vera satt.

Bert fiskimenn við nótaskipum vóru í nánd av upphæddini, ið TV2 vísir á. Har var miðalinntøkan 824.019 krónur áðrenn skatt. Sjálvt í kommunum við lægsta skattaprosenti gevur hetta ikki minni enn eina hálva millión eftir.

**Álvarsamt**

Í klaguni til TV2 sigur Òli Jacobsen millum annað:

»Vi betragter denne sag med stor alvor, da disse forkerte oplysninger giver danske politikere anledning til på et forkert grundlag at drage andre politiske slutninger, som kan få konsekvenser for det færøske samfund på andre områder, hvorved fiskerne let kan blive syndebukke«.

Ein av hesum møguligum fylgjum kom eisini fram í Degi og viku. Christian Thulesen Dahl, formaður fyri fíggjarnevndina hjá fólkatinginum, segði, at blokkstuðulin skuldi ovast á politisku dagsskránna, tá veruleikin sá soleiðis út, at føroyskir fiskimenn ríka seg upp.

**Ongin viðmerking**

Hóast drúgvar royndir hevur tað ikki eydnast okkum at fáa nakra viðmerking TV2. Lotte Mejlhede hevði ábyrgdina fyri tíðindasendingini mánakvøldið, men hon vil ikki gera nakra viðmerking og vísir til journalistin, sum hevur gjørt innslagið. Áðrenn evstamark mikumorgunin var einki at frætta frá TV2.

– Vit royna sjálvandi at fylgja teirri vanligu journalistisku meginregluni um, at tað, vit senda, skal vera rætt, sigur Lotte Mejlhede, men vil ikki gera fleiri viðmerkingar í skrivandi stund.



TV2 –nyhederne.

Klage over nyhedsindslag.

Vi vil gerne have bekræftet, at klagen er modtaget.

Med venlig hilsen
FØROYA FISKIMANNAFELAG
FÆRØERNES FISKERFORENING

Óli Jacobsen
formand

*Òli Jacobsen hevur sagt journalistisku leiðsluni á TV2 eina klagu um innslagið mánakvøldið*

# Mugu upplýsa betri

**Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimur, harmast um innslagið í TV2, men hon ásannar, at upplýsandi arbeiði frá føroyskari síðu ikki hevur verið nóg gott**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fólkatingsumboðið fyri Sambandsflokkin, Lisbeth L. Petersen, heldur ikki, eins og onnur, at innslagið hjá TV2 um hýrurnar hjá føroyskum fiskimonnum var serliga hóskandi.

– Eg haldi, at hatta líkist ongum, sigur Lisbeth L. Petersen.

Umboðið fyri Sambandsflokkin á Fólkatingi er eisini partur av fólkatingsbólkinum hjá Venstre, sum er annar av stjórnarflokkunum. Formaðurin í fíggjarnevndini hjá Fólkatinginum, Christian Thulesen Dahl úr Dansk Folkeparti, sigur við TV2, at neyðugt er at seta blokkstuðulin á ovasta á politisku dagsskránna, tá føroyskir fiskimenn ríka seg upp á henda hátt.



*Lisbeth L. Petersen heldur, at bakgrundsvitanin hjá donskum politikarum er ikki so góð, sum hon eigur at vera*

Lisbeth L. Petersen heldur, at orðini frá formanninum í fíggjarnevndini eru eitt gott dømi um, at bakgrundsvitanin ikki er nóg góð hjá donskum politikarum.

– Hatta er eitt tekin um, at danskir politikarar vita ov lítið um føroysk viðurskifti. Vit eiga sjálvandi ein part av skuldini fyri at ikki at hava kunna danir nóg væl, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon heldur, at bólturin fyrst og fremst liggur hjá landsstýrinum, men hon ætlar sær eisini at gera sítt. Men tað verður trupult hjá Lisbeth at gera nakað her og nú orsakað av summarfrítíðini hjá fólkatinginum.

– Men hatta, sum Christian Thulesen Dahl sigur, er í øllum førum ikki hugburðurin hjá Venstre og Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, sigur Lisbeth L. Petersen.

**Breiður meiriluti**

Lisbeth L. Petersen ber kortini ongan ótta fyri, at blokkstuðulin verður fullkomiliga endavendur á Fólkatingi.

– Tað er ein breiður meiriluti aftan fyri verandi skipan, og eg beri ikki nakran ótta fyri, at vit ikki í sátt og semju kunnu halda fram við verandi ásetingum – eftir samráðingum millum føroyingar og danir, sigur Lisbeth L. Petersen.

Men føroyskir politikarar fáa ein gyltan møguleika at kunna Christian Thulesen Dahl, tá hann saman við øðrum limum í fíggjarnevndini hjá Fólkatinginum vitjar í Føroyum um miðjan august.

## »Ferðslan 2003« útkomin

**Tíðindaskriv**

Síðani miðskeiðis í 80-árunum hevur Landsverk givið út bóklingin Ferðslan, og nú er so »Ferðslan 2003« útkomin.

Í mun til hagtølini í fjør, vísa nýggjastu hagtølini í »Ferðslan 2003« millum annað, at tað í 2003 vórðu koyrdir 199 mió. km. á landsveg-unum í Føroyum, og er tað 7% meira enn í 2002. Í bólklinginum sæst eisini, at hetta talið er hægri enn síðst 80-árunum, tá talið annars var serliga høgt.

»Ferðslan 2003« er at finna sum pdf. fíla á heimasíðini hjá Landsverk www.landsverk.fo